## DAGSINS MEINING

# Undanstøkking

Ikki eru vit føroyingar kendir fyri at ganga í størstu skóm, tá tað ræður um, hvat unnast man øðrum.

Óivað var tað ikki tað mest taktiska løgtingið fann uppá, tá tað frammanfyri eini alt ov passivari pressu samtykti eina eftirlønarskipan fyri landstýrismenn og løgmenn. Men hvat við tí principiella í hesum máli, hetta fyrst at lóggeva fyri síðani undir fólkaligum trýsti at draga í land!

Men er tað so órímiligt, at ein maður/kona, sum hevur verið landstýrismaður og løgmaður í meira enn 8 ár skal fáa hægstu almenna pensión í landinum? Hvussu ber tað til, at sami skattgjaldari, sum gongur við til, at stjórar í almennum partafeløgum fáa milliónaupphædd í løn, ikki unnir fráfarnum løgmonnum eina pensión á linju við eina betri akademikarapensión?

Vildi tað verið rímiligt, um tveir fyrrverandi landsstýrismenn, ið fyltu 67 ár í senn fingu heilt ymiskar pensiónir fyri líka langt tíðarskeið í landstýrinum? Ivaleyst ikki.

Hetta rok, ið hevur verið um eftirlønirnar hjá politikarum appelerar til serføroysku sjúkuna. Flest øll skriva glaðbeint undir eitt mótmæli, men spyr somu fólk hvussu nógv ein meðal landstýrismannapensión verður ella nær lógin var samtykt, so fæst neyvan svar. Einasta man hoyrir, er at pensiónirnar eru “skýhøgar”. Samsýningin verður sum man virðir tað arbeiði, ið gjørt verður. Verður samsýningin hjá politikarum avgjørd eftir lægsta felagsnevnara, so verður samansetingin av ting- og landstýrisfólki hareftir.

Eingin atkvøddi ímóti, tá eftirlønirnar vóru fyri í tinginum. Tað er ein erlig søk at hava atkvøtt fyri, og so forsvara tað sjónarmiðið, hóast tað vísir seg at vera framúr ópopulert. Veljarin gevur sín dóm til valið.

Men tá Helena Dam á Neystabø og Høgni Hoydal, nú, heilt stutta tíð eftir at hava verið við til at lagt eftirlønirnar fram, sum populistiskir veðurhanar vaska sínar hendur, so er tað einki annað enn undanstøkking, óansæð hvat man annars heldur um eftirlønirnar.

Bíligar undanførslur sum at siga seg ikki at hava vitað, hvat uppskotið innibar, skapar ikki nakað trúvirði um Høgna Hoydal. At støkka undan, tá á stendur aftaná at hava roynt at innført nakað í allari friðarligheit, er ikki nakað sum er einum floksformanni til nakran sóma.

Kanska er val ikki so langt burtur, tá hesi bæði fólkini ríða so lágt, sum ikki at taka ábyrgd av sínum egna lógaruppskoti. Hvussu langt kunnu hesir báðir floksformenn fara við sínum “góða mamma tað var ikki eg” politikki, áðrenn veljarin fær eyguni upp?

Politikarar, ið renna undan egnum avgerðum, renna undan ábyrgd, og áttu ikki at bjóðað seg fram til at taka ábyrgd av landinum – við ella uttan eftirløn. Áhugavert kundi annars verið at trivið í leiklutin hjá landsstýrismanninum Bjarna Djurholm í hesum máli, nú tað var hann, sum tók ímóti undirskriftunum fyri ólavsøku. Í hesum sambandi er eisini vert at tríva í grein í Fregnum seinast skrivað av einum av hansara fyrrverandi samgongumonnum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Halgidagslógin

**Hans Birgir Hansen**

Hví hava vit eina danska halgidagslóg galdandi í Føroyum, tá hendan verður brotin hvønn tann einasta sunnumorgun áðrenn kirkjutíð og halgidagar!

Hví ikki fáa landspolitikarar at endurskoða og dagføra hesa halgidagslóg ella fáa hana setta úr gildi sum skjótast, tá vit hava nýggju afturlatingarlógina!

Hví skulu vit loyva fólki at arbeiða og bakaríum, Statoil- og Shell-støðum at hava opið og fótbólt á graslíkisvøllum sunnumorgun, áðrenn fólk fara í kirkju!

Hví skulu bakarí og sølustøð fáa loyvi at bróta halgidagslóg, hví ikki fáa endurskoðað og dagført afturlatingarlógina í ólavsøkutingsetuni!

Hví koma vanligar kioskir, matvøruhandlar og krambúðir ikki undir somu treytir, tá talan er um áðurnevndu, ið máa grundarlagið undan teimum!

Hví ikki seta fólki forboð at arbeiða og spæla fótbólt sunnumorgun áðrenn kirkjutíð.

Tað er ein stak vánalig handilsmentan, vit hava í Føroyum, tá treytir ikki eru eins fyri alt handilslívið, kioskir, matvøruhandlar og krambúðir!

Tað er stak vánaligt, at brúkarar ikki finna út av at lata lív, heilsu, arbeiði, familjulív, frítíðarítriv, at fara fram vanligar yrkadagar!

Tað er ikki minst galdandi, at eingin samferðsla skal vera sunnumorgun áðrenn kirkjutíð – hvørki bygdaleiðir, strandfaraskip ella tyrlan!

Gudstænastur verða at flyta til kl. 11.00 sunnumorgun og upplatingartíðir til kl. 13.00, tá fótbólturin kann byrja um alt landið.

So kundu vit øll fingið frið at sovið sunnumorgun uttan at verða órógvað av áðurnevndu!

# Grillaðu 30 krov



Tað vóru ikki øll, sum hildu ólavsøkuna við at fara til kappróður, fótbólt, konsertir, framsýningar og annað.

Fólk leitaðu eisini aftur í tíðina, og tað hendi á Glaðsheyggi, har víkingastevna varð hildin.

Víkingar hava nógvan mat fyri neyðini, og tað fingu teir millum annað av grillini, har eini 30 krov vórðu grillað. Tað gekk so nógv av mati, at tað var ikki meira enn, at tey kláraðu at grilla so hvørt.

Víkingarnir, sum komu úr fleiri londum, vístu millum annað ymiskt handverk fram, og tey høvdu eisini vápnaleik og glími á skránni.

Tað er felagsskapurin Siðsam, sum skipaði fyri víkingastevnuni.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




# FM vinnararnir tóku næstan alt

**Bara genturnar umborð á Fípuni Føgru kiksaðu. Tjóðstartirnir vóru fleiri enn vanligt, og Havnarbáturin koppaði metinum, sum Skálabáturin setti fyri níggju árum síðani**

ÓLAVSØKU-KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Tað gekk, sum tað plagar at gera á ólavsøku. Hóast talan var um fleiri umstartir, og hóast tveir eyka róðrar vóru (gomul 6–mannafør og 8–mannafør við old boys), so varð seinasta 10–mannafarið komið á mál, tá klokkan var tíggju minuttir í fimm. Tað vil við øðrum orðum siga, at tað fóru tíggju minuttir undir tveir tímar til kappróðurin.

Tað eru fleiri orsøkir til, at tað altíð gongur væl skjótari at fáa kappróðurin á ólavsøku frá hondini, enn tað ger á øðrum stevnum. Ein er, at róðrarteinurin er styttri, enn hann er alla aðra staðni. Ein onnur er, at fasti starturin er nógv fastari, um tað ber til at siga tað soleiðis, enn hann er aðra staðni, og ein triðja orsøkin er, at á ólavsøku eru manningarnar meiri vandar við at leggja til startin og at lurta eftir startdómaranum, enn tær hava verið fyrri á sumrinum.

Tá hetta er sagt, so eigur at verða lagt afturat, at talan var um fleiri tjóðstartir ólavsøkuaftan, enn tað hava verið nakrantíð fyrr í summar. Ørvur, sum endaði aftast í kappingini millum 8–mannafør, mundi ætla sær eina betri plasering, tá teir lupu avstað, áðrenn startskotið hevði ljóðað. Tí var neyðugt við umstarti.

Størsta kappingin um FM heitið var millum 6–mannaførini við monnum. Har var neyðugt við trimum nýggjum startum. Strálan, sum vann kappingina, kláraði ikki at halda sær eina ferð, og tað gjørdu Snopprikkur og Hvessingur heldur ikki.

## Flestu FM vinnararnir fingu fult

Á ólavsøku róðu allir bátarnir 900 metrar. Eitt sindur av spenningi var um, hvussu hetta mundi fara at spæla av, tí í øllum hinum fimm FM kappingunum hevur verið kappast á longru teinunum.

Men tað gekk, sum tað plagar at gera. FM vinnararnir settu trumf á og vunnu eisini síðsta FM róðurin. Undantakið vóru genturnar umborð á Fípuni Føgru, sum noyddust at lata sær lynda næstfremsta plássið. Argja genturnar fóru avstað við ólavsøku gullinum.

## Metið

Størsta trumfin av øllum smekkaðu teir umborð á Havnarbátinum á borðið. Eftir at Eysturoyingur og Vestmenningur seinastu árini høvdu vunnið tvey FM heiti í part, vann Havnarbáturin á ólavsøku fyri sættu ferð í ár.

Umframt FM heitið og ólavsøkusigurin megnaði Havnarbáturin at seta nýtt met í kappingini á stutta ólavsøkuteininum. Skálabáturin átti níggju ára gamla metið, sum varð sett í góður róðrarlíkindum, og Havnarbáturin skar í góðum líkindum eitt hálvt sekund av metinum.

# Havnin fór við øllum

**HB vann hjá kvinnum, og B36 hjá monnum. Klaksvíkingar taptu báðar steypafinalurnar í fótbólti**

STEYPAFINALUR
*Jóannes Hansen*

Tað gekk ikki í ólavsøkufótbóltinum, sum klaksvíkingar høvdu vónað. Í hampuligum líkindum vann HB eitt sindur óvæntað steypafinaluna hjá kvinnum, sum tíðliga seinnapartin ólavsøkudag varð spæld á Ovara vølli í Gundadali. Men tað var neyðugt við umdysti og brotsspørkum, áðrenn tað var greitt, at HB skuldi vinna steypakappingina fyri fimtu ferð. Tað hevur verið spælt um hetta steypið síðani 1998, og nú eigur HB tríggjar partar í tí, meðan finalusigurin hjá KÍ í fjør gevur teimum ein lut í steypinum.

B36 var favorittur í finaluni um løgmanssteypið, og teir megnaðu at liva upp til vónirnar hjá viðhaldsfólkunum. 1–0 sigurin var tann fyrsti hjá B36 í steypafinaluni í tíggju ár. Steypasigurin ber við sær, at B36 sum fyrsta liðið í Europa hevur kvalifiserað seg til Europa Cup kappingina á sumri 2002.

Seinastu fýra árini hevur KÍ verið tríggjar ferðir í steypafinaluni. Teir hava tapt ímóti HB í 1998 og í ár ímóti B36. Og teir vunnu í 1999 ímóti B36. Men hesa ferð vóru tað tey svørtu og hvítu, sum fegnaðust í vetrarveðrinum, meðan rennvátu klaksvíkingarnir noyddust norður aftur við ongum.



*Menninir umborð á Gongurólvur eru útlúgvaðir, tá teir koma á mál*

*Mynd: Jens Kristian Vang*